

## SJÓKVINNA

*- Tað var eitt heilt fantastiskt upplivilsi at vera til skips. Eg angri ikki eina løtu at eg mynstraði umborð á Jákupi B, sigur 64 ára gamla, Johnvá Josephsen í Klaksvík. Í 1962 fór hon á sín fyrsta túr til skips*

happing. Tað var heldur hinvegin: Teir yngru føldu meg sum eina systur, meðan teir eldru føldu meg sum eina dóttur. At eg skuldi verða til ólukku fyri skip og manning, var ongatíð tikið uppá tungu, vísir Johnvá á.

Hon hevði sum vera man nakað av sjóverki, men tá tey vóru komin til Vestmannaoyggjarnar merkti hon einki til tað. Tað einasta sum hon ikki kundi eta var havragreytur, sum hinir av manningini hinvegin dámdu sera væl.

### Aftanfyri skorsteinin

Arbeiðið í messuni umborð á einum skipi verður gjørt eftir ávísari skipan og innan ávísa tíð. Johnvá varð purrað út árla á morgni, og arbeiddi so til nakað út á kvøldið, tá hon fór á frívakt.

Hóast hennara arbeiðið var í messuni, ynskti hon at sleppa at gera tað sama sum allir hinir arbeiddu við.

- Eg meini so við, - teir ótu jú ikki alla tíðina, sigur hon brosandi. - Eg varð tí við í øllum arbeiðinum umborð. Eg slapp tí bæði at egna, krøkja inn, blóðga, arbeiða í lastini og mín sann eisini at banka ís.

Fríløturnar vóru brúktar til ymiskt. Serliga væl dámdi henni

**» Eg veit ikki hví, ið ikki fleiri ungar kvinnur eru farnar til skips gjøgnum árini. Kanska halda tær, at tað er skomm at vera sjómaður**

fríløtuna seinnapart sunnudag. Tá varð altíð borðreitt við lagkøku, og við einum slíkum í hond og einum heitum kaffi aftrat, plagdi hon at seta seg afturum skorsteinin umborð og bara njóta útsýnið.

- Tað var fantastiskt bara at sita soleiðis og nýta tey stóru og veldigu ísfjøllini. Ognú, sum tað var flott.

### Gott at hoyra kvinnurødd

Hóast nógv var at gera umborð, var eisini tíð at tosa heim og við onnur skip sum eisini vóru á fiskileið.

Serliga væl minnist hon ta einu samrøðu, sum hon hevði við Palla hjá Mariannu, sum var skipari umborð á Klakki. Hesin vildi bara vita, hvussu eg hevði tað.

- Hann var eisini bleytur av sær, og hann segði tá, at tað var sera gott at hoyra málið á eini kvinnu sum var til skips.

Dagur datt av degi umborð á

FRAMHALD